

Róðrardagur í Sandavági

Komandi leygardag verður skipað fyri ítróttartiltaki í Sandavági, har serligur dentur verður lagdur á kappróður fyri tey, sum ikki hava luttikið í FM róðri í ár

Edvard Joensen

Sandavágs Ítróttarfelag og felagið Valloyran í Sandavági skipa leygardagin tann 12. august fyri kappróðrardegi í Sandavági.

Talan er um eitt tiltak, sum í høvuðsheitinum er ætlað fólki, sum hava hug til kappróður, men ikki hava luttikið í FM róðri í ár. Men eisini nógv onnur tiltøk verða á stevnuni, sum byrjar við barnadiskoteki fríggjakvøldið. Seinni fríggjakvøldið verður so vanligt diskotek, og stevnan endar við gamlamannadansi í SÍF húsinum leygarkvøldið.

Kappróðurin verður skipaður í bólkum eftir stødd, sum vanligt er. Hóast talan er um motiónsróður, fara kortini onkrar manningar, sum hava róð við í FM kappingini í ár, at luttaka á stevnuni. Til dømis vóru fleiri vágabátar við í gentukappingini, og teir stóðu seg rættiliga væl. Hesar manningar hava víst áhuga. Men tær sleppa ikki at rógva í bólki við øðrum.

Sandavágsfólk skipaðu í 1998 fyri einum líknandi tiltaki, sum fekk sera góð ummæli. So tað er við góðum treysti, at tey fara undir tiltakið aftur í ár, sigur ein ay fyrireikarunum, Hansina á Plógv.

Hon sigur, at tað er ætlanin, at hetta tiltakið skal verða afturvendandi og ganga upp á skift millum ymsu feløgini. Okkurt róðrarfelag aðrastaðni í landinum hevur sagt seg vera sinnað at skipa fyri komandi ár.

Sandavágsfólkini væntaa, at fremmandar bátsmanningar fara at koma til Sandavágs ein slíkan dag, og tí er skipað soleiðis fyri, at gestirnir fáa mat í SÍF húsinum.

Umframt kappróðurin, verður eisini fótbóltskapping fyri børn. Byrjað verður frá morgninum leygardagin, og vinnararnir fáa heiðursmerki, verður sagt úr Sandavági. Skemtidystur verður, men enn er ikki endaliga fastlagt, hvør skal undirhalda í einum slíkum dysti. Av øðrum tiltøkum er at nevna, at skipað verður eisini fyri renni- og súkklukapping.

Eftir kappróðurin leygardagin, verður steypahandan og matsøla í SÍF húsinum. Tiltakið er, sum vera man, eisini eitt tiltak fyri at fáa pengar til ítróttarfelagið, so lutaseðlasøla verður eisini á stevnuni.

Men tað verður ikki bara ítróttur ein slíkan dag. Skipað verður fyri kvøldsetu, sum verður í SÍF húsinum klokkan átta leygarkvøldið. Har verður sangur, skemt og annað undirhald. Eftir kvøldsetuna fer Twilight at spæla til dans.

Neyðugt er hjá kappróðrarfólkinum at boða frá luttøku. Hansina á Plógv sigur, at tey hava sett fráboðanarfreistina til mánadagin tann 7. august. Boðast kann frá hjá Hansinu á Plógv
tlf. nr. 33 25 91 ella
fartlf. nr 21 25 91
ella hjá Jóhonnu í Horni, sum hevur
tlf. nr. 33 24 61.

KÍ skal vinna

Dystyrin millum KÍ og HB norðuri í Klaksvík hevur allar fortreytir til at gerast ein klassikari

Hjá HB er Florin Miháescu endiliga komin fyri seg aftur, eftir drúgvan skaða í lærkrikanum

Stefan í Skorini

Undan dystinum eru seks stig millum liðini. HB er á odda, meðan KÍ er á fimta plássi.

Kravið hjá klaksvíkingum er ein sigur, meðan alt annað ikki er nóg mikið, um KÍ skal hava nakrar vónir um at endurvinna meistaraheitið. Um KÍ vinnur, er alt opið, og teir eru við aftur í stríðnum um gullið. Um HB hinvegin vinnur, so ber til at avskriva KÍ sum meistarar, og HB tekur samstundis eitt stórt fet móti gullinum.

Bæði fara eftir øllum

Bæði havnarmenn og klaksvíkingar leggja dent á, at teir fara eftir øllum trimum stigunum, so lagt er upp til ein spennandi dyst, sum hevur avgerandi týdning fyri meistaraheitið. HB kann tó klára seg við einum javnleiki.

Fyrr í ár vann HB 1-0 á KÍ, og tá høvdu havnarmenn eydnuna við sær, og úrslitið kundi tá eisini verið javnleikur,

Tá ið KÍ spældi móti B36 í Havn í ár, var støðan tann sama, sum hon er nú, har ein sigur er tað einasta, ið kann brúkast. Tá vann KÍ, so klaksvíkingar kenna trýstið. Tað er eisini ein fyrimunur, at spælt verður á heimavølli.

Allan við aftur

Í summarsteðginum kom Allan Mørkøre aftur úr Íslandi, har hann hevur spælt við ÍBV í eitt ár, men nú er hann aftur at sígggja á HB liðnum. Fyrsti dystur hansara verður á Mýrini í Klaksvík móti barndómsfelagnum.

At fáa Allan aftur á liðið er ein veruligur fongur hjá HB, tí hann er tann besti leikarin á liðnum. Hann fer óivað at hava ein stóran leiklut í Klaksvík sunnudagin, og kann eisini verða tann, sum tryggjar HB meistaraheitið.

Tá ið Allan hevur spælt í Klaksvík móti KÍ, er tað ofta komið til skarpskeringar millum hann og gomlu liðfelagarnar, og spælið er vorðið í so harðligt til tíðir. Spennandi verður tí at fylgja við Allani sunnudagin.

Annars eru allir mans klárir hjá HB. Rumenarnir Florin og Gigi hava verið skaddir, men eru nú báðir klárir aftur, so venjarin hevur ein positivan trupulleika. Tað er væntandi, at Florin fer í miðverjuna, og Símin Eliassen verður fluttur upp á miðjuna. Allan Mørkøre verður høgru megin, meðan Hallur Danielsen, Rói Árting, Gigi og Pætur Dahl allir eru um boðið í vinstru. Andrew av Fløtum verður í álopinum saman við Bárði Mortanson ella Jón Róa Jacobsen.

John Ryan ikki við

John Ryan hevur ikki vant síðani seinasta dyst undan steðginum, og hann verður tí ikki við móti HB Tí er ivasamt, hvør verður vinstrumegin.

Kristian á Lakjuni hevur verið skaddur í fótinum, men hann er farin at venja og er klárur aftur. Kristian hevur víst sera nógv í ár, og hann verður væntandi við í byrjunaruppstillingini.

Fyri summarsteðgin komu tveir jugoslavar til KÍ. Áleyparin Srecko Milicevic fekk aldrin fótin fastan og er farin heimaftur, meðan málverjin Zoltan Kujundic framvegis spælir við KÍ.

Annars eru eingir skaðar ella leikbann hjá KÍ, og venjarin kann seta tað besta liðið.

Annað liðið rýkur

Tapandi liðið í Gundadali leygardagin má roknast at vera fokið í FM-stríðnum, so treytirnar eru púra greiðar hjá teimum báðum árstalsfeløgunum

Jákup Mørk

Hjá B36 gekk sum eftir ánni fyrstu vikurnar av landskappingini í ár. Fimm dystir á rað, har ímillum útidysturin móti B68, endaðu við sigri til høvuðsstaðarliðið. Hetta fekk kanska eisini viðhaldsfólkini at droyma søtar dreymir um 1997, men so vaknaðu tey sum við kaldan dreym.

Broytt B36 lið

Næstu fimm dystirnir kastaðu bert trý stig av sær, og spakuliga mátti B36 ásanna, at teir ikki longur vóru oddalið. Fyrst fóru grannarnir úr HB og síðani VB framvið, meðan B68 og KÍ eisini hava gjørt seg til at yvirhála.

Einki er tí at ivast í, at B36 í dag hevur sett sær fyri at vinna dystin, soleiðis at skeiva gongdin kann vendast.

Tað er tó ikki við sterkastu manning, at B36 ger seg til at taka ímóti toftamonnum. Bjarni Prior, sum leingi royndi at spæla, hóast hann var skaddur í lærkrikanum, er enn ikki komin fyri seg, meðan Jens Kristian Hansen og Mikkjal Thomassen báðir hava leikbann, orsakað av reyðum korti í seinasta dystinum undan steðginum.

Hinvegin mynstrar B36 við tveimum nýggjum leikarum, sæð í mun til fyrru kappingarhálvu. Í álopspartinum hava teir fingið tilgongd av pólverjanum, Maciej Maryniak, og sum skilst, tykjast havnarmenninir væl nøgdir við avrik hansara higartil. Verjuparturin, sum undan kappingarárinum varð roknaður sum veikasti partur av liðnum, er eisini styrktur. Somuleiðis við útlendskum leikara, við tað at Darius Magdisauskas hevur skift FS Vágar búnan við tann hjá B36 í summarsteðginum.

So hjá havnarmonnunum er bert eftir at kanna, um nýggju leikararnir kunnu verða við til at lyfta liðið upp aftur móti tindunum.

Fróði aftur klárur

Hjá toftamonnunum eru treytirnar undan dystinum júst tær somu, sum hjá vertunum. Stigatalið er hitt sama, og tað merkir samstundis, at tørvurin á trimum stigum eisini er eins tráður.

Kanska týdningarmesti leikarin hjá toftamonnum, Fróði Benjaminsen, er tøkur aftur, eftir at hann misti fleiri av várdystunum orsakað av skaða í knænum. Hinvegin eru hvørki Jan Petersen ella Jákup Eli Olsen enn til reiðar at fara á øllin. Jan hevur bruna í hælsinuni, meðan Jákup Eli hevur slitið somu sinu.

Heldur ikki Mannbjørn Nesá, sum annars hevur roynst sera væl í ár, er tøkur. Hann hevur leikbann.

Kennir seg illa viðfarnan av FSF

Birgir Sondum er farin í farloyvi sum dómari restina av kappingarárinum, tí at hann følir seg settan til viks av FSF

Stefan í Skorini

Birgir Sondum hevur verið fótbóltsdómari í 14 ár, men enn er hann ikki sloppin at døma steypafinaluna, sum er tað størsta ein dómari kann uppliva her á landi. Seinastu árini hevur FSF tikið aðrar dómarar framum Birgir, men hesir hava ikki dømt eins leingi og hann, og tað heldur hann verða løgið.

Birgir hevur leingi staðið aftanfyri kendar garvaðar dómarar, men nú eru teir allir givnir at dømna, og tí heldur Birgir, at hann av røttum skuldi fingið møguleikan at døma steypafinaluna.

Bikarið fleyt yvir

Tá ið Birgir ikki slapp at døma steypafinaluna í ár millum HB og GÍ, hevði hann fingið nóg mikið.

- Grundin til at eg nú havi biðið um farloyvi er, at eg ikki varð settur at døma steypafinaluna. Eg væntaði at sleppa at dømna finaluna, men eg varð enn einaferð settur til viks, meðan aðrir minni royndir dómarar eru slopnir framat.

Birgir sigur seg hava væntað fimm tey seinastu árini at verða settur til finaluna, men hann er lopin um hvørja ferð. Hetta hann hevur eisini gjørt vart við hetta hjá FSF.

Eftir eina hending aftaná dystin millum KÍ og B68 19. mai norðuri í Klaksvík hóttu allir dómararnir í dómarafelagnum við verkfalli, men tá tað kom til stykkis, vóru tað bara Oddmar Andreasen og Birgir Sondum, sum vóru í verkfalli tað umfarið.

Oddmar Andreasen boðaði eftir hetta frá, at hann gavst at dømna vegna ta viðferð, hann fekk frá FSF. Birgir sigur, at orsøkin til at hann ikki varð settur at dømna steypafinaluna var, at hann stuðlaði Oddmari í tí stríðnum.

- Fyri mær virkar tað, sum at man skal revsast fyri at hava tikið undir við Oddmari Andreasen, tá ið dómararokið var, sigur Birgir Sondum.

Hvørki Óli Holm formaður í dómaranevndini hjá FSF ella Hans Falkvard Hansen formaður í dómarafelagnum siga seg kenna nakað til ónøgd frá Birgiri. Heldur ikki vilja teir siga, um Birgir varð innstillaður til at dømna finaluna.

Spurdur um hann nakrantíð fer at dømna aftur sigur Birgir, at um brúk er fyri honum næsta kappingár, so er hann til reiðar at finna floytuna og kortini fram aftur.

Dómaratrot

Nú hava fýra dómarar úr Havn lagt floytuna á hillina innan stutta tíð. Sjúrður Norðbúð gavst eftir kappingarárið í fjør, Kim Ejdesgaard hevur eisini tikið seg aftur, Oddmar Andreasen gavst eftir dystin í Klaksvík og nú er Birgir Sondum farin í farloyvi.

Hetta hevur við sær, at bara seks dómarar eru til at dømna 1. deild hjá monnum, og tað er heldur lítið til fimm dystir hvørt vikuskifti.

Óli Holm í dómaranevndini vónar ikki, at hetta gerst ein trupulleiki, men hann ásannar, at tað er ov lítið bara at hava seks dómarar tøkar.

Týdningarmikil dystur í Runavík

Sunnudagin hittast NSÍ og FS Vágar í Runavík, og er hesin dystur sera týdningarmikil fyri bæði liðini. NSÍ skal halda á eftir sigurin móti KÍ, meðan FS Vágar skal upp um niðurflytingarstrikuna sum skjótast

Heini í Skorini

Seinast NSÍ og FS Vágar hittust, var tað kanska besti og mest undirhaldandi dystur í ár. Endaliga úrslitið gjørdist tá 3-3, og vónandi fáa vit ein líka góðan dyst inni í Runavík sunnudagin. NSÍ tóktust at koma úr kreppuni teir vóru í, tá teir í dystunum beint fyri summarsteðgin fingu sjey stig í trimum dystum. Harav vunnu teir síðsta dystin móti KÍ, so alt bendir á, at teir eru á veg uppeftir.

Christian Høgni við aftur

20 ára gamli áleyparin Christian Høgni Jacobsen er nú við aftur, eftir at hann er opereraður í knænum. Hetta kemur sera væl við, eftir at NSÍ ikki hevur havt nakran veruligan áleypara í fyrru helvt. Verjuleikarin Dánial Hansen loysti álopstrupulleikan beint fyri steðgin, tá hann m.a. skeyt fýra mál móti Sumba. Kanska venjarin Trygvi Mortensen í Dániali og Christan Høgna kann skapa eitt sera vandamikið álopspar, um hann velur ikki at flyta Dánial aftur í verjuna, har hann dagliga leikar. Annars eru allir menn tøkir hjá NSÍ, so liðið kann ikki verið betri fyri til dystin móti FS Vágum sunnudagin.

FS Vágar mist og fingið fólk

FS Vágar hevur í summarsteðginum eftir øllum at døma mist sera týdningarmikla verjuleikaran Darius Magdisauskas, sum er farin til B36. Teir hava tó fingið ein nýggjan litava, sum ber navnið Igoris Kirilovas. Hann er 28 ára gamal og spælir á miðvøllinum. FS Vágar hevur eisini mist 19 ára gamla Eyðfinn Fjallsbak til HB, hóast hann ikki var fastur maður hjá FS Vágum í fyrru helvt av kappingini. Eyðfinn er farin av tí at hann gongur í skúla í Havn. Høgribakkurin Emil Hentze er eisini skaddur, men annars eru allir mans tøkir í Vágunum.

Dysturin er sera týdningarmikil fyri FS Vágar, tí tað sum í løtuni um ræður hjá teimum, er at koma úr botninum sum skjótast. Teir vunnu sera óvæntað 3-2 á B68 síðsta dyst fyri summarsteðgin, so teir kunnu, hóast teir liggja á níggjunda plássi, fara til runavíkar við sjálvsálitið sunnudagin.

VB fer eftir meistaraheitinum

Tað er langt síðani, at VB hevur ligið so væl fyri til seinnu hálvu, og í Vági trúgva teir uppá meistaraheitið. Á Sandi hugsa teir meira um at yvirliva

Stefan í Skorini

VB hevur ikki ætlanir um at leggja árarnar inn, hóast teir hava havt eitt sera gott kappingaár higartil.

Í summar hevur liðið verið á venjingarlegu í Danmark, har liðið hevur fyrreikað seg til seinnu hálvu. Teir fingu eisini nógv burturúr, tær tvær vikurnar liðið var á flatlondum.

VB hevur ongar skaðar ella leikbann, men verjuleikarin Janus Kjærbo er fluttur til Danmarkar, og hann verður ikki at sígggja aftur á VB liðnum. Hann hevur verið fastur maður, so tað er eitt skot fyri bógvin hjá VB.

Í Vági trúgva menn uppá, at tað ber til at gera seg galdandi í gullstríðnum, og tað hava teir eisini víst í fyrru hálvu. Trý stig móti B71 er tí eitt krav.

Í fyrra dystinum vann B71 1-0 á Eiðinum, men sandoyingar vóru tá sera hepnir. Venjarin hjá VB sigur, at ein slíkur dystur sæst bara einaferð hvørji hundrað ár.

B71 eisini mist

Ein av hollu stuðlunum hjá B71 seinastu árini hevur verið Róni í Soylu, men hann er nú fluttur av landinum.

Annars er alt fólkið tókt hjá B71. Danirnir Alex Nielsen og Micheal Jørgensen verða við aftur, men tað er ikki eydnast at fáa nakran nýggjan spælara til felagið.

Sandoyingar eru í løtuni illa sperdir í botninum, og talan kann gerast um niðurflyting. Sandoyingar hava bara 8 stig saman við FS Vágum og eru beint omanfyri niðurflytingarstrikuna. Av tí at B71 hevur áður vunnið á VB, trúgva teir eisini uppá sigur sunnudagin.

Málslúkurin er við aftur hjá Sumba

GÍ hevur verið tað størsta vónbrotið í landskappingini í ár, meðan sum vant Sumba stríðist fyri lívinum

Stefan í Skorini

Fyrra dystin millum hesi bæði vann GÍ 2-0, men sannførandi var tað ikki, tí málini komu ikki, fyrr enn farið varð um teir 80 minuttirnar.

Sumba liggur í løtuni niðast, og teimum tørva fleiri stig, um 1. deildar fótbóltur aftur skal verða at sígggja á Krossinum næsta ár. Seks stig eru komin til høldar higartil, og báðir dystirnir eru vunnir á heimavølli. Í fjør vóru 11 stig nóg mikið til at yvirliva, men líkt er til, at meira krevst í ár.

Sumba hevur ongar skaðar ella leikbann, og nakrir gamlir kenningar verða aftur at sígggja í Sumba. Dánjal Jóhan Joensen og Jan Poulsen eru báðir afturkomnir úr Danmark. Hetta styrkir nógv um liðið hjá Sumba, sum ofta hevur havt trupulleikar við at manna lið til dystir.

Málslukurin hjá Sumba í fjør, Nebojsa Veljkovic, hevur ikki spælt við Sumba í fyrru hálvu vegna skaða í knænum. Nú hevur hann verið heima í Jugoslavia og fingið skurðviðgerð, so hann verður eisini við sunnudagin. Nebojsa skoraði tíggju mál í fjør, og tað er nógv, tá hugsað verður um, at Sumba bara fekk ellivu stig.

Magni leikbannaður

GÍ hevur higartil bara fingið ellivu stig, og teir eru nærri niðurflyting enn heiðursmerkjunum. Tó hevur GÍ vunnið steypakappingina og hevur sostatt tryggja sær luttøku í UEFA Cup næsta ár.

Martin Thomsen spældi í verjuni hjá GÍ í fyrru hálvu, men hann varð bara leigaður til juli, so hann verður ikki við aftur. Liðformaðurin, Magni Jarnskor, er leikbannaður til dystin móti Sumba. Annars eru eingir skaðar hjá GÍ.

Málið hjá GÍ er fyrst og fremst at sleppa úr botninum, og ein sigur móti Sumba sendir liðið rætta vegin.

1. deild menn

Støðan undan 11. umfari

		d	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	HB	10	7	-	2	-	1	21	10	11	23
2	VB	10	6	-	3	-	1	22	13	9	21
3	B36	10	6	-	0	-	4	30	14	16	18
4	B68	10	6	-	0	-	4	22	18	4	18
5	KÍ	10	5	-	2	-	3	26	9	17	17
6	NSÍ	10	3	-	3	-	4	20	18	2	12
7	GÍ	10	3	-	2	-	5	15	19	-4	11
8	B71	10	2	-	2	-	6	9	15	-6	8
9	FS Vágar	10	2	-	2	-	6	12	25	-13	8
10	Sumba	10	2	-	0	-	8	6	42	-36	6